## DAGSINS MEINING

# Undirsjóvartunnilin eitt samferðsluframbrot

Í gjár var ein stórur dagur, fyri ikki bara Vágoynna, men fyri allar Føroyar. Undirsjóvartunnilin er, hóast partafelagsform við óneyðugari umsiting, eitt stórt frambrot í føroyskari samferðslusøgu. Hetta er fyrstu ferð síðan brúgvin við Streymin varð gjørd miðskeiðis í sjeytiárunum, at miðstaðarøkið í Føroyum verður víðkað.

Lat okkum hugleiða eitt sindur um føroyska samferðslu og flokkmentalitet. Fyri góðum 10 árum síðani gingu – primert havnafólk – og savnaðu undirskriftir móti undirsjóvartunnilinum. Svend Aage Ellefsen, táverandi landsstýrismðaur í samferðslumálum gjørdist ársins ulka, ti hann noktaði at taka ímóti hesum undirskriftum. Sjálvandi skuldi Svend Aage Ellefsen havt tikið ímóti undirskriftunum, og tað skerst ikki burtur, at ráðini ikki vóru til undirsjóvartunnilin, júst meðan kreppan var uppá tað hægsta.

Men hvørji vóru argumentini tá? Argumentini vóru fyri ein stóran part ikki, at tunnilin skuldi útsetast, ti ráðini ikki vóru til tess. Argumentini vóru, at "tað var púra vilt" og "tað búgva bara tvey túsund fólk i Vágum". Undir allari kreppuni varð grenjað um, hvussu vilt tað var við hesum undirsjóvartunnili. Hetta bleiv eisini mangan endurgivið í donskum fjølmiðlum sum eitt ørvitisprojekt av teimum heilt stóru. Ein yvirgang var ringt at finna ein tann einasta unga persón í Havnini, ið tordi at siga hart, at undirsjóvartunnilin var ein skilagóð íløga fyri Føroya land.

Hvat vilja vit siga við hesum? Hetta vísir, at vit føroyingar eru herviligir at fylgja einum ráki, ið ikki altíð er líka vælfunderað. Tað vísir seg, at er rákið sterkt ein veg, so eru tey fá, ið alment tora at siga nakað annað. Undirsjóvartunnilin var einmælt samtyktur á Føroya Løgtingi í 1988. Trý ár seinni vóru ógvuliga fáir politikarar, ið alment tordu at halda fast um tað skilagóða í ætlanini, hóast ráðini ikki vóru til tess júst tá. Nú 10 ár seinni finnur man ongan, ið heldur, at undirsjóvartunnilin er eitt ørvitisprojekt, hóast nógv munnu vera tey, ið róptu upp um hetta. Alt var ikki púra vilt í 80'unum, hóast nógv var. Á sama hátt er ikki alt so gott og sunt, ið verður framt í dag, hóast nógv er.

Føroyingar mugu læra at føra ein fjølbroyttan dialog um mál, heldur enn at hoppa uppá eitt "alt ella einki" rák. Hetta kenna vit eisini frá fullveldismálinum. Ongastaðni er felagsnevnarin lægri millum føroyingar, enn tá tað ræður um samferðslu og lønir hjá øðrum.

Ein dagur sum í gjár minnir okkum á farna tíðir, tá samferðslunetið var hægst prioriterað í landinum við risaíløgum uttan brúkaragjaldi – hugsið bert um Oyggjarvegin og brúnna um Streymin. Føroyingar kunnu allir gleðast um hetta samferðsluframbrot, men her skal ávarast ímóti at síggja tunlar sum rakstrargøgn, ið skula gjalda seg sjálvan aftur við til dømis bummpengum. Teir gjalda seg sjálvan fleirfalt aftur til samfelagið í spardari bíðitíð og tryggari farleið. Trivnaður og trygd kann ikki gerast upp í pengum, og tí skal ein landsvegastubbi heldur ikki síggjast isolerað. Byrjar man konsekvent uppá slíkt , so er framtíðin ikki bjørt hjá útjaðarnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fjølmiðlafikseraður landsstýrismaður

**Hergeir Nielsen**



30. september fingu vit uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri 2003 á tingborð.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinumálum, hevði tá havt allar møguleikar, men onga loysnir funnið á Vágs havn og onga loysnir funnið á tunnilssambandinum Øravík Hov.

Ikki eitt klovið oyrað setti hann av til hesi mál, tá ið hann slepti teimum, og lat tey upp í hendurnar á løgtinginum.

Síðani løgtingsfíggjarlógaruppskotið loysnaði úr landsstýrinum, hevur meirilutin í fíggjarnevndini arbeitt víðari við tí.

Hesin meiriluti umboðar landsstýrisflokkarnar, hesin meiriluti hevur samskift við sínar flokkar, og tað er haðani uppskotið kemur framaftur á tingborð.

Har situr eingin Bjarni Djurholm, og annars eingin av teimum andstøðumonnum, sum landsstýrismaðurin er so forliptur í.

Landsstýrismaðurin er skilliga firtin yvir, at Suðuroyggin fekk eina loysn tvørturyvir høvdinum á honum.

Harafturat er hann ovurfirtin yvir, at hann ikki náddi í sjónvarpið at boða frá henni.

Har vit onnur gleðast yvir, at málið er loyst, leikar landsstýrismaðurin í, tí at sjónvarpið hevur dittað sær til at tosa við ein tingmann, sum, tá uppskotið frá landsstýrismanninum kom fram, segði seg vera ónøgdan við prioriteringina av íløgunum.

Suðuroyggin hevur nú fingið eina loysn, sum vit øll fegnast um. Eina loysn, landsstýrismaðurin ikki var førur fyri at koma við, tá ið hann hevði møguleikan fyri at koma við henni.

Í staðin fyri at gleðast, so leikar hann í, og sigur seg sjálvan og fleiri andstøðumenn fram hava bjargað íløgunum í Suðuroynni.

Hergeir Nielsen eigur ongan lut í nøkrum sum helst, ja, hann hevur beinleiðis mótarbeitt framburðinum í Suðuroynni, heldur landstýrismaðurin fyri.

Hetta og annað møsn kennir hesin fjølmiðlafiskeraði landsstýrismaður seg kallaðan til at bera fram í berari øði, tí hann ikki slapp í sjónvarpið við tí úrsliti, ið fíggjarnevndin saman við okkum øðrum var komin til.

Mær vitandi hava, hvørki eg sjálvur ella nakar annar, tikið nakað frá landsstýrismanninum.

Tann loysnin, ið funnin er, kravdi ikki nógvan tekniskan førleika í fyrstu atløgu, og als ongan pedagogiskan, so har var ikki so nógv brúk fyri Bjarna Djurholm.

Talan var fyrst og fremst um ein góðan vilja, og um skilagóðar raðfestingar, sum landsstýrismaðurin vónandi fer at lata vinnumálastýrið og landsverkfrøðingin umsitað á skynsamiligan hátt.

Skilja vit landstýrismannin rætt, so heldur hann seg eiga monopol upp á tíðindastovnarnar, og tað fatan hava helst fleiri havt í fleiri ár. Antin tað er útvarp ella tað er sjónvarp, vit tendrað, so fáa vit júst hendan landsstýrismannin 9 av 10 ferðum.

Nú er hann vorðin firtin, tí hann ikki er komin upp á 10 av 10 ferðum.

Sjálvur fari eg at nýta høvið til at takka øllum góðum kreftum, íroknað landsstyrismanninum, fyri at vit eru komin á mál við hesum íløgum.

# Hellan - Eitt slag av eini andaligari trilogi í einari bók!

**BÓKAÚTGÁVA**
*Tíðindaskriv*

Hellan er ein skaldsøga, men samstundis meira enn tað. Hon sigur eina søgu, men ikki uttan at seta spurnartekin við trúarlív og -læru hjá bæði leikum og lærdum, og hon er í tráð við vísdómsorðini sum Prædikarin ber fram, at einki er nýtt undir sólini.

Upprunaliga er skaldsøgan svensk, skrivað av svenska biskupinum Bo Giertz (1905-1998), um svensk kirkjulið í trimum tíðarskeiðum, við góðum hálvthundrað ára millumbili.

Søgan er um prestarnar í sóknini, og viðurskiftini teirra millum, og við fólkið á staðnum. Vit fáa nógvar góðar og rámandi persónslýsingar, sum ikki eru okkum ókendar, og vit fáa fatan av, at gjøgnum allar tíðir eru nakrir spurningar, sum vit øll, meira og minni, stríðast við, tó uttan altíð at koma til sama svar.

Vit lesa eisini um, hvussu prestar og onnur, bæði í andaligari armóð og í yviandaligheit, møta Guðs náði, og fáa møguleikan at byrja av nýggjum.

Hellan kann onkuntíð órógva og arga okkara moralsku áskoðan, m.a. tí at onkur prestur kann drekka sær eitt glas, men helst er tað tilvitað, tí stórur dentur verður lagdur á treytaleysu náði Guðs, sum hvørki er uppiborin ella treytað av okkara gerningum, men júst er náði. Hetta kann óiva av onkrum skiljast sum ein umbering fyri ikki at ganga so høgt upp í lívsførsluna.

At bókin í støðum kann tykjast í so kirkjutrúgv, og er ikki sørt litað av hugsjónum høvundans, tekur ikki dýpdina og dygdina frá henni. Hellan kann lesast bert sum ein skaldsøga, men hon hevur eitt hægri mál, enn bert at stytta um stundir. Hon kann lesast av øllum, og øll hava brúk fyri, og kunnu fáa gott av, at venda teimum spurningum, bókin tekur upp.

Bókin er álvarsom, men avgjørt ikki keðilig at lesa, tí hon er als ikki uttan humor.

Samanumtikið ein sera góð bók, viðkomandi og hugvekjandi.

Og at vit hava fingið hana á egnum máli, er bert at fegnast um, og eg vil mæla øllum til at lesa hana, havandi í huga orð Paulusar í 6. kapitli í Rómverjabrævinum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Røgvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Kringvarpsskattur - enn einaferð



**Schandorff Vang**

Eg havi fyrr funnist at kringvarpsskattinum - og harvið eini hækking av sjónvarpsgjaldinum.

Tá heitti eg á mentamálaráðharran um at leggja ÚF og SvF saman í ein stovn.

Hesa meining havi eg styrkt eftir avgerð mentamálaráðharrans um at hækka hyggjaragjaldið og eisini eftir viðmerking Mikkjal Helmsdals í bløðunum í farnu viku.

Sjálvandi kunnu tey á SvF ikki vera ónøgd við eina hækking av hyggjaragjaldinum - eini meirinntøku á umleið 5 mió. kr. - uttan so mikið sum at rætta hond frá síðu.

Sjálvandi leggur tað trýst á stovnin. Umleið 2/3 skal brúkast til loypandi tøkniíløgur, og kravi er enn umleið 3 mió. kr. fyri at halda somu framleiðslu.

T.v.s. at hesar 3 mió. kr. skulu brúkast til lønir - ella hvussu?

Tí sama framleiðsla má merkja tað sama sum líka nógvar endursendingar og líka nógv útlendskt tilfar.

Eg haldi als ikki vit kunnu liva við hesum!

Ljóspunktið í viðmerking Mikkjal Helmsdals er: "…hevði niðurskurðurin av bæði starvsfólkahópinum og virkseminum verið so ógvusligur, at rættast hevði verið at tikið málið upp, hvørt tað yvirhøvur gevur eina meining framhaldandi at hava eitt alment føroyskt sjónvarp."

Tað er júst tað!

Er yvurhøvur nøkur sum helst meining at hava SvF sum egnan stovn í framtíðini?

Lat okkum nógv heldur fáa lagt ÚF og SvF í ein og sama stovn. Tað fyrsta vit høvdu spart var ein stjóraløn, tað næsta er ein niðurskurð í umsitingini til minst 2/3 av tí hon samlað er í dag - og so eru bæði útvarps- og sjónvarpsfólkini før fyri at gera bæði sløgini av sendingum (flestu hava álíkavæl arbeitt á báðum stovunum), og helst hevði ikki verið neyðugt við øllum fólkunum, sum í dag eru á stovnunum.

Munnu ikki einar 5 mió. kr. longu vera spardar her?

Samanlegging krevur fleksibilitet hjá starvsfólkunum, men við víðkaðum møguleikum fyri at breiða seg fjølbroyttari, trúgvi eg, at ein samanlagdur stovnur hevði havt nøgdari starvsfólk - og størri møguleika fyri at yvirliva við sama samlaða hyggjara-/lurtaragjaldi, sum vit hava í dag - og enntá kanska við nakað minni.

Fleiri eru tey, sum høvdu valt SvF frá um møguleikin var fyri tí. Eg eri ein av teimum heilt fáu, sum bert havi SvF at taka til, men eg eri fyri langari tíð síðan vorðin troyttur av endursending av endursendingum, og uppafturtøkur av sjónvarps raðsendingum og gomlum filmum.

Hygg bara í SvF m.a. 14. december, tá verður sendur filmurin "Eitt jólaævintýr" og 15. december "Tá jólamenn eru ringast".

Nær vóru hesir filmar sendir seinast?

Í fjør?

Eg meini tað!

# Til Føroya Landsstýri



**Svenning Borg**
*Vágur*

Tillukku við væleydnaða skatta- og avgjaldspolitikkinum, tit hava lovað Føroya fólki skattalætta, men ongin skattalætti er at hóma, men eitt økt skattatrýst er veruleiki.

Sjónvarpsgjaldið, sum jú er ein skattur, er hækkað úr 1500 kr.upp í 2000 kr., hettar skulu Føroyingar gjalda, sjálvt um teir ikki hyggja at SVF, tí teir hava aðrar sjónvarpsstøðir at hyggja at, og har halda teir seg fáa meira fyri peningin.

Hví ikki lata føroyingum hava frælsi til at velja sjálvir, um teir vilja gjalda fyri at síggja SVF, tað kann gerast við at keypa ein kassa og eitt kort frá SVF, tann sum ikki er áhugaður at hyggja at, tí sum SVF hevur at bjóða, keypir sær ikki henda kassa, og er tí ikki tvingaðaur at gjalda fyri nakað sum hann ikki hyggur at.

Serstakliga góðar tíðir hava verið í Føroyum nú í nøkur ár, men hesar góðu tíðir hava mest sum bert verið fyri tað almenna, hjá tí vanliga fólkinum verður bara minni og minni eftir av hvørjari forvunnari krónu, sjónvarpsskatturin er eitt talandi dømi um hettar, nú arbeiðir føroyingurin meira fyri tað almenna enn fyri seg sjálvan, hetta má vera tað, sum sitandi samgonga kallar fyri frælsi.

# Tøkk til manningarnar um Vestmannasund



**Marjus Dam**
*Løgtingsmaður*
*Sambandsfloksins,*
*Vágarnar*

Tíðin gongur og stórar broytingar eru hendar við farleiðini um Vestmannasund.

Í dag verður seinasti túrurin sigldur, og sjóvegis farleiðin avloyst av føstum sambandi.

Sum ein av teimum, ið hevur nýtt hesa farleið nógv, fari eg at takka tykkum fyri eitt gott arbeiði. Tit royndu altíð at gera tykkara besta. Fyri tey sjúku vórðu tit ein trygd, tá tit um kvøldi og á náttartíð fluttu sjúklingar um sundið. Serstakliga minnast vit teir av manningunum, ið fórust av vanlukku.

Túsund tøkk og alt gott ynskist tykkum framyvir.

Eg vil eisini nýta høvi at ynskja tykkum eini Gleðilig Jól og eitt av Harranum signað og gott Nýttár.

# Hvat vilja Astrup og Javnaðarflokkurin?



**Rúni Hentze,**
*løgtingsmaður*

Fyrst í 90-unum flutti Føroya Banki alt sítt EDV-samskifti til Danmarkar, og vandi var fyri, at Elektron var niðurlagt. Tá tók tingið ta avgerð, eftir uppskoti frá Finnboga Ísaksoni, at forbjóða at persónsupplýsingar vóru fluttir av landinum. Hetta forðaði fyri, at tann vitan og tann førleiki sum føroyingar høvdu uppbygt fór fyri skeyti. Henda avgerð førdi eisini til, at Føroya Banki mátti flyta sítt samskifti heim aftur. Eg havi ikki hoyrt annað enn rósandi orð fyri ta avgerð, ið tá var tikin. Elektron yvirlivdi og hevur ment seg síðan eins og áður.

Fyri eini tíð síðan fái eg eitt brævsendandi frá Føroya Banka, sum spyr um eg vil hava mínar flytingar gjørdar gjøgnum eitt ið kallast PBS í Danmark. Eg helt tá, at hetta var ein løgin spurningur. Hví skuldu mínar rokningar knappliga flytast gjøgnum eina danska skipan? Tað fyrsta, sum rann mær til hugs, var tann, eftir míni fatan sera ódámliga avgerðin, sum Føroya Banki tók fyrst í 90-unum, tá hann flutti alt sítt EDV-samskifti av landinum.

"Er ætlanin nú aftur at flyta EDV-virksemið av landinum og taka grundarlagið undan Elektron?" var mín fyrsti tanki. Tá eg haraftrat ikki var ónøgdur við mína avgreiðslu í bankanum, so sum hon var farin fram, gav eg bankanum boð um, at mínar flytingar ikki skuldu gerast gjøgnum PBS. Í seinastuni hevur tjak verið í bløðunum um hetta sama evni. Tað sum hevur eyðkent kjakið er, at tað er bankin, sum gjarna vil sleppa av landinum við sínum virksemi. Eg havi ikki lagt merki til nakra ónøgd hjá kreditorum ella debitorum við verandi skipan. Tvørturímóti hava kreditorar givið til kennar, at teimum ikki dámar, at avgreiðslan verður flutt.

Tað vil v.ø.o. siga, at tað eru bankarnir og ikki kundarnir, sum vilja hava viðurskiftini broytt. Mín spurningur er HVÍ. Í Fregnum 22. nov. fær Jørn Astrup Hansen tað at síggja út, sum um at orsøkin til at flyta avgreiðsluna av landinum er at geva kundunum eina betri tænastu. Men seinni í greinini gevur hann til kennar, at tað dreygar seg um pengar, sum eru at spara fyri bankan. Men ringt er at fáa eyga á, hvar sparingin er, og hvussu stór hon er. Orðarætt sigur hann: "Under V&T (Eektron) har pengeinstitutterne ikke hidtil beregnet sig et særskilt gebyr for automatiske opkrævninger". Útreiðslurnar hava ikki verið størri enn so, at rentumarginalurin hevur kunnað borið útreiðslurnar. Víðari sigur Astrup, at skal rentumarginalurin "fastholdes, forudsætter det, at omkostningerne ved betalingsformidlingen inddækkes ved gebyrer." T.v.s., at eftir at avgreiðslan er flutt av landinum, verður neyðugt at gjalda fyri flytingarnar og tað má so aftur merkja, at avgreiðslan verður dýrari, og at hesi "gebyrer" fara beinleiðis í danskan EDV-stovn.

Hetta var so eitt sindur um, hvussu eg sum vanligt viðskiftafólk havi upplivað støðuna.

Orðaskiftið á tingi um fyrispurningin hjá K. Magnussen um viðgerð av persónsupplýsingum var, sum eg upplivdi tað, meir ein viðgerð av landsstýrismanninum Høgna Hoydal enn av málinum. Høgni Hoydal vísti á, sakligur sum altíð, at tingið fyri einum ári síðan hevði samtykt lóg, sum í § 16 sigur, at meginreglan er, at persónsupplýsingar skulu varðveitast og viðgerast í Føroyum. §17 loyvir so nøkrum undantøkum eftir ávísum treytum, um tann skrásetti og dátueftirlitið geva loyvi. At enda verður í hesi § heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um flutning av persónsupplýsingum, herundir at steðga ella avmarka flutningi til útlond.

Eftir viðgerðini hjá rættarnevndini av hesi lóg at døma, er ongin ivi um, at nevndin er samd um, at byrgjast skal fyri,at peningastovnarnir flyta sítt EDV-samskifti av landinum, men nevndin vil ikki sjálv áseta í lógini, hvussu hetta skal fremjast, men áleggur landsstýrismanninum at gera hetta við kunngerð.

Tá so Høgni Hoydal skal fremja henda vilja tingsins í verki, eru javnaðarmenn í øðini og leggja Høgna Hoydal undir at taka tingið av ræðið! Vit vita, at trýstið frá peningastovnunum er hart at sleppa av landinum við EDV-samskiftinum, ja so hart, at tá dátueftirlitið noktaði bankunum at fremja hesa ætlan, bleiv trýst lagt á henda stovn, so hann at enda mátti geva loyvi. Hetta virkar eitt sindur ódámligt og minnir ikki sørt um støðuna í 1994. Hví peningastovnarnir eru so altráir at flyta sítt samskifti av landinum er líka óskiljandi í dag sum fyrst í 90-unum. Hvør so enn orsøkin er, tykist tað løgið, at javnaðarflokkurin so heilhjartaður setir tingsins vilja til viks til frama fyri eina ógvuliga ivasama bankaætlan, sum kanska kann føra til, at okkara egni datastovnur bert verður ein rein avgreiðsluskipan. Hesin stovnur sum eftir míni meining hevur víst stórt hegni og nýskapan. Onki er at ivast í, at hesin stovnur kann vera eitt gott íkast til menning av eini framtíðar KT-vinnu í Føroyum.